

Seinni partur:

# Stórur blí›skapur allasta›ni

**Alla sta›ni, har vit komu, vór›u vit sera væl móttikin, og blí›semi var óført. Um tú gloymdi eitthvørt eftir onkusta›ni, komu tey rennandi aftaná tær vi› tí gloymda lutinum. Hetta hendi meira enn ta einu fer›ina**

Eisini kom fer› aftaná fer› fyri, tá vit koyrdu súkklutaxa, at spurt var› um, hva›ani tú kom. Um tú seg›i Føroyar, vistu teir ta› sjálvandi ikki, men um tú dagin eftir koyrdi vi› sama persóni, og hann spurdi sama spurning, var svari› javnan, jú at ta› visti hann væl, tí hann hev›i kanna› á heimskortinum, hvar hatta landi› lá. Áhugin var altí› stórur at fáa eitthvørt at vita um okkara land og vesturheimin sum heild.

Løgi› at hugsa sær, at ræ›uleikarnir, sum tey hvítu hava framt mótvegis hesum fólki, ikki hevur skapt ein illvilja og eina øsing mótvegis okkum vesturlendingum. Vit skulu tó minnast til, at fólk undir 30 ár, júst vóru fødd um ta› mundi›, tá kríggi› enda›i. Tó var sagt okkum, at um tú kemur longur nor›ur í landi› til 170, sum er gamla marki› millum Su›ur-og Nor›urvietnam og til Hanoiøki›, har beinlei›is kríggj og »teppibumbing« fóru fram, so vóru øll ikki líka blí› vi› útlendingar.

### Agent Orange

T‡sdagin 14. mars, me›an annar lærarin stó› og práta›i vi› ein gøtuhandilsmann á høvu›sgøtuni í Saigon, upplivdi vit eina søguliga hending.

Brádliga hoyrdust sirenur frá politibilum og her›na›arakførum, og eitt stórt bilafylgi kom framvi›. Mitt í trunkanum var ein stór limosina vi› amerikanska merkinum á kúfangaranum. Hetta var amerikanski vara uttanríkismálará›harranum, Warren Christopher, sum vitja›i Vietnam. Ta› søguliga í hesi hending er, at hetta var fyrsta fer› sí›ani 30. apríl 1975, tá amerikanar fl‡ddu av takinum á amerikansku sendistovuni í Saigon, at teir alment vitja›u landi› aftur.

Tá vietnamesiski handilsma›urin sá amerikanska vimpulin, gjørdust eyguni heldur sorgarblí›, og bert tvey or› komu frá honum, »Agent Orange«.

Hetta var heiti› á kemisku eiturevnunum, sum amerikanarar sprændu yvir stórar partar av Vietnam fyri at oy›ileggja allan gró›ur, solei›is at møguleikarnir hjá kommunistunum at virka í hesum økjum skuldu gerast so truplir sum gjørligt. Tá tí›in at ni›urbróta hesi eiturevni er sera long, eru hesi øki í stóran mun ón‡tilig enn tann dagin í dag. Eisini stó›ust nógvir mannaska›ar í kjalarvørrinum av hesum eiturevnum

### Fer›in nor›ureftir

**Saigon - Dalat**

Úr Saigon gekk fer›in nor›uryvir vi› bussi til b‡in Dalat uml. 250 km í luftlinju í ein útnyr›ing úr Saigon, og hesin túrurin vardi næstan 9 tímar. Hóast vit høvdu fingi› at vita, at fer›in fór at ver›a bæ›i drúgv og mø›sam, gjørdist hetta ein sera áhugaverd fer›, har tú sá og upplivdi so nógv, at tú ikki rættuliga gav tær far um tí›ina.

Vit fóru úr Saigon og koyrdu nor›ureftir eftir høvu›svegi 1. Har var bert ein høvu›svegur, sum fór allan vegin nor›ur til høvu›ssta›in Hanoi. At gerast leysur av stórb‡num var lættari sagt enn gjørt, tí øll fer›sla nor›ureftir skal eftir Saigonbrúnni, og tí kom skjótt proppur í. Me›an vit standa á brúnni, kemur ein av vanligu rutubussunum til Hanoi upp á sí›una av okkum. Hesin var yvirfyltur av fólki, fena›i og fer›agó›si og líktist at kalla einum yvirpynta›um jólatræi. Vit frættu, at túrurin til Hanoi í hesum gamla útslitna bussi vardi uml. 48 tímar. Bussurin hev›i trækarmar kring rútarnar og líktist bussinum hjá Buss Óla frá fimmtiárunum. Tá hitin samstundis lá uppímóti teimum 40 stigunum, vóru vit fegin um okkara 10 ára gamla buss vi› air condition.



*Heimskenda myndin tá ein su›urvietnamesiskur herma›ur skj‡tur ein vietcong hermann*



*Tunnlaneti›, sum vietcong hermenninir grava›u uttanfyri Saigon, er í dag eitt ví›agiti› fer›amannamál*

Tú kanst eisini fara vi› jarnbreytini nor›ur til Hanoi, men jarnbreytin og serliga tokvognarnir og lokomotivini eru í sera ringum standi, solei›is at nógvar seinkingar eru. Orsaka› av tí vánaligu búskaparstø›uni í landinum eru at kalla ongar íløgur gjørdar í lokomotiv og a›ra útger›, sí›an Vietnamkríggi› enda›i. Nøkur lokomotiv eru so gomul, at tey enn n‡ta damp sum drívmegi.

Um tú koyrir gjøgnum Vietnam, eru at kalla ongantí› longri enn uml. 50 km millum áirnar, og hesar eru eins og æ›rarnar í mannakroppinum eitt bindili› millum su›ur og nor›. Hetta kann tykjast langt um hugsa› ver›ur um, at ta› einans eru 100 km su›uri úr Vági og nor›ur til Ei›is, men tá eigur at vera havt í huga, at Vietnam er uml. 1650 km úr enda í annan. Stórur partur av øllum flutningi fer eftir áunum, og har sært tú húsbátar, lastabátar vi› ey›kendu "eygunum" mála› á bógvin, fólk sum rógva smábátar vi› at n‡ta føturnar o.m.a. Hesin ró›rarháttur var eins vanligur haryviri og okkara háttur at n‡ta armar og yvirkropp.

Vit koyrdu gjøgnum kaffi-, te-, og gummiplantagur. Náttúran skifti frá láglendi vi› rísakrum til lí›ir vi› bananvøkstri. Hesar bananir eru smærri enn vanligu bananirnar uml. 10 cm langar og hava ein søtari smakk.

Allasta›ni ávegis og í Vietnam sum heild kundi tú keypa alskyns fruktir, og ta› var serliga hesin vælsigna›i fríski angin og smakkurin, sum fær fruktirnar á okkara lei›um til at fána burtur, um samanbori› ver›ur.

Longur nor›ur vit komu, nærri komu vit fjallalendinum.Vegurin til Dalat fór um fjallaskør›, har ta› hægsta var 2400 metrar yvir sjóvarmálanum, og vit løgdu til merkis, at næmingarnir gjørdist heldur tigandi hesa løtuna. Hóast náttúran var avbera vøkur, var› ta› vi› ávísum ampa, at ta› var› koyrt á hesum smølu vegunum ytst á fjallatromini. Men lukkutí› komu vit fram í øllum gó›um.

Ávegis til Dalat vitja›u vit eina líttla bygd nevnd »Cock village,« har eitt av minnilutafólkunum, Lat fólki› b‡r. Her møttu vit einum ri›uli av óvitum, sum bæ›i vóru skitnir og skræddir, men tó tóku øll ímóti okkum vi› einum smíli og brosandi eygum, og hetta fekk okkum at hugsa, um tey ikki vóru líka gla› og eydnusom fyri ta› líttla, tey høvdu, sum okkara børn, i› hava alt. Í hesi bygd keyptu vit teppi og a›rar vovnar lutir, sum hetta fólkaslagi› er kent fyri. At virka eitt teppi tók einari vevkonu uml. 1 1/2 måna›, og prísurin var einans 150 kr. Hóast tey hildu seg hava gjørt kvetti›, sat tú eftir vi› einum heldur ringum smakki í munninum, tá hugsa› ver›ur um, hvussu líti› tey fingu fyri sítt arbei›i.

### Dalat

B‡urin gongur undir navninum »perlan í Vietnam« ella »mini Paris« og liggur kring Xuan Hoang vatni›. Frammanfyri vatni› finnur tú tann vakra orkidegar›in, sum var› planta›ur í 1966. Upprunaliga var› b‡urin grunda›ur av tí franska kolonivaldinum fyrst í 20.øld, tí umstø›urnar og møguleikarnir at senda fronsku hermenninar heim til Fraklands vóru somiki› krevjandi, at funni› var› fram til eitt øki, har hitin og náttúran líktist tí fronsku. Dalat skuldi sostatt n‡tast til rekreatión hjá teimum fronsku hermonnunum. Í b‡num finnur tú bæ›i Eiffeltorn og glasiligar franskar kolonibygningar. Her hildu vietnamesiski kongurin (Bao Dai) og tann franska elitan til um summari›, og sta›i› ver›ur enn tann dagin í dag mett sum perlan í Vietnam. B‡urin var órørdur av krígnum, tí hetta vóru bá›ir partar tigandi samdir um, og í dag er vanligt, at brú›arpør í Vietnam fara brú›leypsfer›higar- og ikki minst til »Kærleikans dal« sunnanfyri b‡in.

Øki› kring Dalat er avbera fruktagott, og her vaksa blómur, sum ver›a fluttar út til grannalondini eitt nú til Singapore og Thailand. Eisini jar›ber, soppar, alskins fruktir og kaffiplantagur sóust so langt eyga› rakk.

### Frá Dalat til Nha Trang

Eftir stuttan ste›g í Dalat helt lei›in næsta morgun fram til Nha Trang longur nor›uri.

Túrurin ni›ur úr fjøllunum var eins spennandi og túrurin til Dalat bert vi› tí broyting, at nú var dagsl‡si, og vit sóu enn betur vakurleikan, men eisini ógvusligu hæddirnar, sum farast skuldi um. Men enn einafer› komu vit ni›ur á slætt í øllum gó›um, og bussurin helt sína lei› í ein eystan oman móti havinum. Fyrsti b‡urin, vit komu til, var Pnam Rang, i› var n‡ttur sum herflotastø› hjá amerikumonnum undir Vietnamkrígnum. Her komu vit aftur inn á høvu›sveg 1 og koyrdu beina lei› nor›ur til strandarb‡in Nha Trang, har vit komu út á seinnapartin.

Hesin b‡ur var í BBC sendingini »lonely Planet«, nevndur sum eitt av stø›unum í heiminum vi› teimum vakrastu strondunum, og hetta er ein av orsøkunum til, at b‡urin er "dømdur" av myndugleikunum til at ver›a eitt av fer›amannaøkjunum í Vietnam. Politisku mynugleikarnir í Vietnam gera nevniliga av, hvar í landinum ymiskar framlei›slur og vinnur skulu vera. Men hóast hesa stø›u, og hóast hetta var besta tí› fyri fer›afólk, sóu vit ógvuliga fá útlendsk fer›afólk. Sostatt vóru vit í tí hepnu stø›u at uppliva eitt land, á›renn fer›avinnan hev›i fingi› fastatøkur á tí. Uttan iva fer fer›avinnan at økjast munandi komandi árini, so hvørt sum fer›avinna og fólk varnast, hvussu nógv hetta land hevur at bjó›a.

Í Nha Trang var sandstrond, so langt eyga rakk. Á nor›ara armi sást ótal av smáum útró›rarbátum, sum hvørja nátt fóru út á fiskilei› eystanfyri b‡in. Tá tú seint á kvøldi hugdi út gjøgnum vindeyga› á hotellinum og leit eystur í hav, møtti tær ein sjón, sum tú ofta upplivir í Føroyum á vetrardegi. Nevniliga hetta at síggja bjørtu ljósini frá fiskiførunum úti í havsbrúnni á køldum vetrarkvøldi ella nátt.

Í Nha Trang vitja›u vit eitt ta› størsta sjóvarsavni› í Asia vi› fiskum og verum úr havinum kring Vietnam. Somulei›is fóru vit útfer› vi› báti til eina líttla oyggj nakrar fjó›ringar eystanfyri b‡in, har vit vitja›u eitt akvarium. Hetta var sermerkt, tí umframt alskyns fiska- og hávasløg o.m. a, var bygningurin sjálvur evna›ur sum eitt gamalt skipsvrak.

Eisini vitja›u vit Cho Dam markna›in í mi›b‡num í Nha Trang. At vitja markna›ir er altí› naka› serligt, tí har í›ur í lívi, og teir eru krumtappurin í flestu b‡um. Í tí partinum av markna›inum har bert vietnamesar hildu til, sást tú mangt forvitnisligt eitt nú livandi hønur, i› longu vóru royttar og klárar at koyra í pottin, so skjótt høvdi› reyk av. Her vóru eisini slangur og onnur djór, sum er vanligur matur har yviri.

Vit vitja›u eisini eina Champagodu og eitt Buddatempul í b‡num. Hetta eru stórsligin bygningsverk, sum fólki n‡ta dagliga, sum bi›ja um eitthvørt. Yvirhøvur var vir›ingin fyri trúnni og tí farnu slektini stór. Í hesum templum búu umframt munkar eisini foreldraleys børn, sum klára›u sína skúlagongd vi› at selja postkort o.t. til fer›afólk.

Fjór›a dagin flugu vit su›ur aftur til Saigon vi› einum gomlum Fokker propellflogfari, og hetta minti ikki sørt á tí›ina, tá Fokker Friendship flogfari› fleyg til Føroya.

Seinastu tveir dagarnar í Saigon vitja›u vit m.a. savn vi› n‡mótans list, fóru útfer› vi› smábáti eftir Saigonánni, vitja›u Ho Chi Minh savni› og royndu annars at fyrireika okkum til fráfer›ina úr Vietnam.





*Vietnam er eitt sera vakurt land*

### Heimfer›in

Mikudagin 15. mars kl.12.00 fóru vit av hotell Oscar, og hetta var ein rørandi løta, tí øll starvsfólkini stó›u uttanfyri hotelli› og veittra›u okkum farvæl, tá bussurin fór hagani.

Ta› seinasta, vit sóu av Vietnam, vóru óteljandi amerikansku hangararnir á flogvøllinum, og vit vóru enn einafer› mint á kríggi›, sum vit vi› fráfer›ina úr Føroyum hildu ey›merkti alt, sum hev›i vi› Vietnam at gera. Men vit gjørdust klókari. Vietnam er í dag so ómetaliga nógv meira enn Vietnamkríggi›.

Túrurin heimaftur gekk somu lei›, sum tá vit komu, t.e. via Singapore og Keypmannahavn til Vágar. Hósdagin 16. mars kl. 17.00 lendu 21 troytt, men sera vælnøgd fólk í Vágum, og gó›an tíma seinna vóru vit aftur í Tórshavn. Ein spennandi fer›, sum vardi í 17 dagar, men byrja›i 1 1/2 ár frammanundan, var komin at enda

### Hvat kom burturúr?

Mangan hoyrist millum manna, at námsfer›ir eru ikki anna› enn fjant og fjas, og ta› er ringt at taka dagar ímillum, tí mámsfer›ir kunnu vera so mangt.

Sum lærarar hjá flokkinum á hesum ógloymandi túri eru vit sannførdir um, at hetta var lærdómur fyri lívi›.

Umframt ta›, sum næmingarnir lærdu í skúlanum um søgu Vietnams og bókmentir, i› l‡stu landi› frá ymiskum sjónarhornum, lærdu næmingarnir eisini at samstarva og samskipa, at skipa fyri tiltøkum, at seta seg í samband vi› persónar, stovnar og fyritøkur, at leggja fer›ina til rættis, og ikki minst at savna og spara pening til fer›ina. Úr rúgvuni kann nevnast, at næmingarnir seldu lutase›lar, høvdu køkutombula, skóru og seldu fisk, gjørdu kanning fyri vinnumálast‡ri o.m.a.

Á fer›ini lærdu tey m.a um a›rar mentanir, fátækradømi og ræ›uleikar, i› standast av kríggi, at síggja, hvussu onnur liva, a›rar si›venjur, si›ir og trúgvir.

Nú naka› er fráli›i›, kunnu vit seta okkum at hyggja at filminum, i› var› tikin á fer›ini, og kunnu í hesum sambandi minna okkum á or›ini hjá H.C.Andersen, »at rejse er at leve«.

*Gerandismyndir úr Vietnam*





